# Miðvikan

Óli Jacobsen
olijacobsen@post.olivant.fo



Ernestina:

# Jarðarferðarsangurin var í lummanum á tí deyða Jógvani

**Í seinastu tveimum pørtunum hevur verið greitt frá sjálvari vanlukkuni við Ernestinu so væl sum hetta letur seg gera. Nevniliga við at tveir av manningini sjálvir greiða frá. Men tað eru fleiri áhugaverdar frásagnir í samband við hesa vanlukku, sum eisini eru partur av søguni**

**3. partur**

### Ein heilt serlig søga um mynd av Ernestinu

Fyrst fara vit til eina heilt serliga søgu um myndina av Ernestine, sum vit hava í hesum partinum.

Hon hevur eina søgu, sum neyvan hevur sín líka. Hana átti Eskild Norðbú, sonur Poul Joensen, ið var motorpassari við Ernestinu. Sum fyrr greitt frá var tað eisini Eskild, sum fekk í lag útvarpssamrøðuna við Ziska Jacobsen, sum vit høvdu í seinasta part.

Poul var júst komin hvítklæddur úr koyggjuni at starta motorin, tá ið skipið fór á land, og hann fekk tí ikki høvi til at lata seg betur í. Tí var hann serliga illa fyri í tí, sum hendi seinni.

Í samband við minningartúrin til Íslands í ár 2000 kom henda myndin undan kavi. FF-blaðið lænti myndina, og Eskild greiddi frá søguni um hana og annars tær umstøður, sum hann visti at siga frá viðvíkjandi pápanum í samband við hesa hending.



*Ernestina, mynd við eini sera sjáldsamari søgu*

### Teknaði Ernestine út frá munnligari frásøgn

Eskild, sum doyði fyri fáum árum síðani, greiddi soleiðis frá:

Hetta er ein mynd av Ernestinu, ið pápi mín, sum var motorpassari við, fekk teknað, meðan hann lá á ríkissjúkrahúsinum á sumri 1930. Hann kom at liggja saman við manni, ið hevði handalag at tekna. Eftir samrøðu við pápa um, hvussu Ernestina sá út sum skip, teknaði hesin maður hetta bílætið av henni. Man sær, at maðurin hevur signerað bílætið við navninum C. Jensen og árstalinum 1930.

Pápi var altíð glaður fyri bílætið og plagdi at siga, at soleiðis sá Ernestina út. Hon var tiltikin vøkur skonnart.

At pápi endaði á ríkissjúkrahúsinum á sumri 1930 var av løstunum, ið hann fekk hasa náttina. Likam hansara var mestsum alt fryst, sum tað var. Tá ið teir, ið vóru eftir á lívi, skuldu fara at royna at vinna upp hús, vóru teir ikki mentir at taka pápa við. Hann var ikki gonguførur. Teir máttu lata hann liggja eftir undir einum varða saman við Jógvan Thomassen, sum doyði seinni.

Komnir til Selvogar bað Eli Eltør ein mann koma við sær, hagar pápi mín lá, og fóru teir avstað við hesti og sletu. Tað var langt at ganga, umleið tveir tímar. Teir tóku so pápa og tann deyða mannin, Jógvan, heim til húsar. Tá var pápi meira deyður enn livandi. Men lív fingu teir aftur í hann. Løsturin, sum hann hevði fingið av kuldanum, hevði gjørt nógvar liðir á likaminum stívar, so hann mátti á sjúkrahús. Fyrst var tað í Klaksvík. Men her fingu teir ikki lív í allar liðirnar, og var hann sendur á ríkissjúkrahúsið. Har gekk betri, og lív fingu teir í allar liðirnar uttan fremsta lið á aðrari stórutá. Hann tók teir av honum, og var hetta einasti varandi løstur, ið pápi fekk.

Hann var tá 39 ár, og hann livdi, til hann var 85 ára gamal. Hann helt fram sum sjómaður, motormaður, til hann gavst sum 70 ára gamal.

### Poul livir ikki enn?

Sjálvur var eg við elsta soni mínum, Jógvani, í Íslandi í 1966, og sjálvandi ætlaði eg at síggja staðið, har Ernestina fór á land. Men eg var so óheppin, at henda dagin var so tjúkt í mjørka, at tað gjørdist einki. Men eg var í Selvogi henda dagin. Har fekk eg samtalu við mannin, sum saman við Eli Eltør við hesti og sletu vóru eftir pápa.

Hann spurdi meg, um eg kendi motorpassaran á Ernestinu. Tá ið eg segði, at tað var pápi mín, var hann ógvuliga rørdur og segði, at hann mundi ikki liva longur. "Jú", segði eg, "hann livir enn og var sum sjómaður í Íslandi í fjør." "Nei, hvat sigur tú, hvør skuldi trú slíkum," svaraði hann aftur.

### Myndin er nú aftur Ríkissjúkrahúsinum

Hetta var frásøgnin hjá Eskild, og

Framhald á síðu 16